meira enn bara

# FAMARA

# FRAMTÍÐAR HUGSJÓN



v/ Rakul og Johan Dalsgaard

August 2012

# Búfólkini



**Johan**



**Rakul**



**Rúni**

**Í mai 2010 fóru Rakul og Johan fyrstu ferð til Fámara. Teimum dámdu so væl, at tey ynsktu at búseta seg har fyri at byrja eitt nýtt, alternativt lív. Rakul og Johan settu seg í samband við Búnaðarstovuna, sum vísti teimum til uppsitaran, sum glaður gav teimum bæði loyvi og lykil.**

Rakul og Johan hava nú búleikast í Fámara í meira enn tvey ár og eru meira ásttikin í staðnum enn nakrantíð. Tey eru bæði námsfrøðingar. Harumframt er Johan handverkari og hevur eina eitt ára bóndaútbúgving. Hesar førleikar ætla tey at gera fult brúk av á staðnum.

Í juli 2011 flutti Rúni Jacobsen eisini til Fámara. Rúni hevði áðrenn hetta búð á einum sambýli í Tórshavn fyri ung við sinnistrupulleikum. Rúni hjálpir til við djórunum o.ø. á garðinum, og er annars sum eitt húsfólk.

> **"Í Havn má Rúni hava einar tveir stuðlar, men í Fámara ER hann ein stuðul"**

Hetta segði Johan í sjónvarpstíðindasendingini hjá Kringvarpi Føroya, sum varð send fríggjakvøldið 13. juli 2012. Í somu sending sigur Rúni seg hava funnið lívið aftur. Rúni er eitt livandi prógv um, at Føroyar hava brúk fyri einum frístað sum Fámara, har øll kunnu koma til rekreatión og rekonvalesens í styttri ella longri tíðarskeið.



*Fámara í sólskini*

# Støðan í dag



*Festið í Fámara*

**Í tíðini, Rakul, Johan og Rúni hava búð í Fámara, hava tey varnast møguleikar á staðnum og hava gjørt ymiskar royndir, sum tey hava tvinnað saman við teirra lívsáskoðan og førleikum, og niðurfelt í hugsjónina, lýst í hesum skrivi.**

Tað var skjótt eftir, at Rakul og Johan fluttu til Fámara, at tey varnaðust ein alstóran tørv á einum frístaði í Føroyum. Henda tørv hava tey staðfest ferð eftir ferð, tá tey hava tosað við fólk, og fólk hava vent sær til tey. Møguleikarnir fyri júst at skapa ein frístað í Fámara eru óendaligir.

**Umvælingar o.a.**
Hesi seinastu tvey árini hava Rakul og Johan tí saman við Rúna arbeitt upp á garðin hvønn dag. Hann var í sera ringum standi, tá ið tey komu hagar. Har var hvørki vatn ella el. Oljufýringin riggaði ikki, umframt at hurðar, tøk, vindeygu og annað manglaði í bygningunum. Uppruddingin tekur tíð, og umvælingarnar, sum eru gjørdar higartil, eru gjørdar so við og við, sum ráð og umstøður hava verið til tess, eins og hugskotini eru ment, sum tey eru komin.

**Landbúnaðarvirksemi**
Rakul og Johan hava í hesum tíðarskeiði m.a. roynt at ment høsnahald sum vinnuveg, har tey selja tað, tey skemtiliga kalla ”ordilig egg”, og hava samstundis eisini gjørt royndir at velta epli og dyrka grønmeti.

# Fámara er fólkaogn



*Johan, Rakul og djór í Fámara*

**Johan er undirhaldari, radiovertur, tónleikari og annað, og Rakul og Johan hava, síðan tey búsettust í Fámara, gjørt filmar, útvarpssendingar, fyrilestrar og ymiskt annað undirhald, soleiðis at Fámara so við og við er vorðið sera væl kent í føroyska almenninginum, umframt eisini í ávísan mun uttanlands**.

Rakul og Johan trúgva á gjøgnumskygni, opinleika og erligheit, og tey ætla at halda fram at dokumentera tað, sum fer fram á garðinum, bæði við films- og radioupptøkum.

- **YouTube** - Fleiri filmar eru lagdir út á Youtube um arbeiðið á garðinum. Tilsamans hava higartil fleiri enn 50.000 fólk sæð hesar filmar.

- **Radio Fámara** - Eisini hevur Kringvarp Føroya sent tveir partar av Radio. Fámara hvørja viku í eitt hálvt ár. Hetta eru stuttar undirhalds- og tíðindasendingar, har Johan greiðir frá tí, sum hendir í Fámara.

# Almenni áhugin stórur

**Tað eru júst filmarnir á Youtube og Radio Fámara, sum hava gjørt Fámara kent bæði millum føroyingar og útlendingar.**

Virksemið á garðinum er á henda hátt vorðið eitt slag av framhaldandi realityshowi, og fólk fylgir við framgongdini á garðinum. Filmarnir og radio eru tí týdningarmiklir liðir í marknaðarføringin av Fámara, samstundis sum hetta er reklama fyri Føroyar sum heild.

Almenni áhugin er sostatt sera stórur. Áðrenn Rakul, Johan og Rúni fluttu til Fámara vóru fá sum vistu, at staðið fanst, men eftir hesi tvey árini er Fámara komið á føroyakortið og er vorðið landskent.

**Fámara kent út um landoddarnar**
Eisini er boðskapurin um Fámara komin út um landoddarnar, tí líka frá skírishósdegi og til heystfrítíðin er liðug koma bilar og bussar dagliga til Fámara, bæði við føroyskum og útlendskum ferðafólki.

Í løtuni gera fólk eisini ein dokumentarfilm um Johan og verkætlanina í Fámara.

**Ferðaráðið víst áhuga**
Stjórin í Ferðaráð Føroya, Guðrið Højgaard, sigur m.a. hetta, eftir at hon og Jóhannes Jensen, nevndarformaður í Ferðaráðnum, høvdu verið og vitjað í Fámara:

> **Hetta er einki minni enn eitt fantastiskt upplivilsi.**
> **Vit eru fullkomiliga bergtikin.**
>
> **Tað er ein uppliving í serflokki at uppliva tílíkt**
> **- eg vil kalla tað – "mentanarligt eksperiment".**
>
> **Tað er ikki so nógv sjálvt staðið, sum ger tað so spennandi.**
> **Tað er samanrenningin av staðnum og fólkunum aftanfyri,**
> **sum ger tað so einastandandi.**

# Framtíðarhugsjón



*Rúni og vitjandi í Fámara*

**Ætlanin er at gera Fámara til ein fíggjarliga og umhvørvisliga burðardyggan frístað, har arbeitt verður á hesum trimum høvuðsøkjum:**

**Landbúnaður**

**Ferðavinna og mentan**

**Sosial tiltøk**

# Fyritøkan Fámara

**Ætlanin er at skipa virksemið í Fámara í einari fyritøku, nevnd “Fámara”, og at fáa fyritøkuna góðkenda, alla sum hon er. Tey krøv, ið verða sett, verða so við og við rokkin, uttan at neyðugt verður at seta seg í stóra skuld.**

Tað, at fyritøkan fer at vaksa spakuliga, men stútt, alt eftir, hvat ber seg og ikki, ger væntaðu sukséina bara til ein spurning um tíð.

**Fígging**
Búskaparliga verður Fámara tengt at teimum ymisku tiltøkunum, sum verða stýrd sum serligar smærri ella størri verkætlanir, ið verða fyriskipaðar á staðnum, ella gjørdar í samstarvi við privatfólk, fyritøkur, kommunalar ella almennar myndugleikar, sum virka innan tey ymisku virkisøkini, ella hava áhuga í samstarvi.

Av tí at so nógv gjøgnumskygni er, hevur tað serligt reklamuvirði at vera við í teimum ymisku verkætlanunum, so væntandi fæst sponsorpeningur eisini til vega tann vegin.

Hendan hugsjón er spakuliga vorðin til og er lagað eftir umhvørvinum – í huganum og í tráð við, at árstíðirnar hava skift og Rakul og Johan hava havt samband við kreativ fólk.

Tey hava hesi tvey árini, tey hava búð í Fámara ásannað, at fólk má búgva á staðnum alt árið, skal Fámara verða lív lagað.

**Í tráð við almennar ætlanir**
Uttan at Rakul og Johan frammanundan vistu tað, er hendan hugsjón beint í tráð við ætlanirnar hjá Mentamálaráðnum við Fámara fram til 2007: at staðið skuldi verða nýtt til eitthvørt alternativt listarligt ella mentanarligt endamál.

Hesar ætlanir vórðu sleptar orsakað av, at ongar av teimum verkætlanum, sum vórðu havdar á lofti, náddu longri enn til skriviborðið tá.

Men nú er hon her – Fámarahugsjónin:

# Hugsjón

> ”
> Vit vilja gera Fámara til ein føroyskan frístað,
> har slóðað verður fyri nýggjum leiðum innan virkisøkini:
> landbúnað, ferðavinnu og sosiala økið,
> so tað kreativa menniskjað verður í miðdeplinum
> ”

# Árstíðirnar ráða

**Vár, summar og heyst**

- Fyrstu ferðafólkini koma skírisdag, og tey seinastu fara, tá heystfrítíðin endar.
- Eggini verða koyrd í klekimaskinuna um várið.
- Høsnarungarnir verða slaktaðir um heystið.
- Um várið verður velt, epli verða sett niður, og um heystið verða tey tikin uppaftur.
- Um várið verða drívhúsplantur settar niður og grønmeti verður sátt, sum um heystið verður heystað.

**Vetur**
Fámara er sum eitt tivoli ella eitt sirkus:

- Um várið, summarið og um heystið verður nógv virksemi, tørvur á nógvum fólki og djórini verða víst fram.
- Um veturin verður alt sett í stand, og næsta sesong neyvt løgd til rættis.

# Tey trý vinnuøkini

## Landbúnaður

- Høsnahald
- Øðrvísi tæðing
- Eggjaframleiðsla
- Slátur av flogfenað
- Eplavelting
- Grønmetisdyrkan
- Drívhúshøll
- Djóragarður og -handil
- Djórahotel og -pensionat

## Ferðavinna & mentan

- Pílagrímsferðir
- Bóndagarðsferiur
- Eindagsvitjandi
- Yvirlivilsistúrar
- Legur
- Kamping
- Fyritøkur og aðrir bólkar
- Tónleikabólkar, listafólk o.o.
- Fámarafestivalur
- Biltúrafólk / matsøla
- Radio og filmar

## Sosial tiltøk

- Pedagogiskt grundarlag
- Tilboð til fólk við øðrum tørvi
- Kúlladreingir/gentur
- Pleygufamilja
- Rekonvalesens-/rekreatiónsstaður
- Eftirviðgerð
- Fámara - eitt stað fyri øll

# Landbúnaður




*Fámarahanin, Black Adder*

**Landbúnaðarvirksemið er alt ov einstáttað í Føroyum. Alt hevur higartil at kalla bert snúð seg um seyðahald, og møguleikarnir við bæði djórahaldi og at dyrka jørðina eru slett ikki troyttir. Hesa avbjóðing ætla Rakul og Johan at taka upp.**

**Høsnahald**

Johan sær stórar møguleikar í at hava høsnahald sum primera inntøkukeldu innan landbúnaðarøkið, og metir fyrimunirnar av at hava leysgangandi hønur verða fullkomuliga óviðgjørdar og yvirsæddar innan kríatúrhald í Føroyum í dag.

Johan hevur nógvar royndir innan júst hetta økið, og dugir at síggja fleiri spennandi møguleikar heldur enn ivasamar forðingar innan høsnahald. Við síni vitan um høsn ætlar hann at slóða veg og vísa á gongdar leiðir, hvussu vit í Føroyum kunnu seta landbúnaðarfyritøkur á stovn við høsnahaldi sum høvuðsvinnuvegi.

Endamálið er at hava 600 leysgangandi hønur í aldrinum 0-5 ár í seks høsnarhúsum. Hetta endamál verður rokkið eftir 6 árum eftir niðanfyristandandi leisti. Í Fámara er ovmikið pláss til

júst hetta. Hønur eru støðufastar, t.v.s. at tær fara ikki longur enn eitt vist frá høsnarhúsinum, og tí er ikki neyðugt við hegni.

**Øðrvísi tæðing**
Ætlanin er, at høsnarhúsini skulu vera leys av jørðini, soleiðis at tey kunnu flytast. Umstøðurnar í Fámara eru fyrimyndarligar til júst hetta, tí lendið er stórt og vallað.

Eina ferð um mánaðin verða høsnarhúsini togaði eina bátslongd við bili, so at høsnatøðini liggja eftir á vøllinum, og nýtt gras verður gólv inni í húsunum. Tá høsnarhúsið er flutt, verður skeljasandur við kálki stroyddur á stykkið, har hønurnar hava búð og gingið. Á henda hátt verður tann annars eyðkenda føroyska leirmoldin meira porøs og hagin livandi aftur.

Væltæðaða jørðin kann so brúkast til at velta epli og annað grønmeti í. Høsnatøð inniheldur tvær til tríggjar ferðir meira køvievni enn tøð hjá jóturdjórum, og høsnatøð verður nógvastaðni skýrd at vera heimsins næstkrafmiklasta tøð. Tað, at høsnarhúsini kunnu flytast, ger at jørðin ikki verður tæðað á einum avmarkaðum øki, men at allur bøurin verður tæðaður. Ein høna etur 150 g av fóðri um dagin og helvtina fær hon til vega sjálv.

Tá málið er rokkið eru seks høsnarhús á hvør sínum 2000 m² stykki. Ætlanin er tó allatíðina at hava eitt hús eyka, soleiðis at tað hvørt ár skiftivís stendur eitt tómt hús, sum er til umvælingar, betringar og nýhugsan, og sum møguliga eisini kann brúkast til goymslu.

T.v.s. at hvørt ár fær jørðin uttan um eitt høsnarhús tíð at “hvíla”. Hetta merkir, at hvørt ár í 7 ár verður eitt høsnarhús bygt á einum 2000 m² stykki, so at allur bøurin við árunum verður tæðaður. Tilfarið til húsið verður goldið av inntøkunum frá hønunum og eggunum árið fyri. Sostatt eru bara útreiðslur fyrsta árið.

**Eggjaframleiðsla**
Meginreglan við øllum høsnarhúsunum er tann sama: Pláss er fyri 100 hønum og teirra fýra-fimm hanum at sita á vaglum. Hvør høna skal hava 20-25 cm av vagli, t.v.s. at tað verða 21-26 metrar av vagli í hvørjum húsi.

Tað eru seks-sjey vagl í hvørjum húsi, t.v.s. at talan verður um tilsamans 4x6 metrar av vagli í hvørjum húsi. Fram við einum veggi eru reiðurkassar við hoyggi. Tað fara at verða umleið ein kassi fyri hvørjar átta hønur. Í húsinum verður altíð atgongd til fóður og vatn, so tað ongantíð verður troðkan um fóðurílatið.

100 kg av fóðri kunnu vera í hvørjari fóðurautomat og hesar verða fyltar tvær ferðir um mánaðin. Eisini kunnu hønurnar ganga inn og út, sum teimum lystir. Á hendan hátt verða tær ongantíð stressaðar og liva eitt vanligt, gott og róligt djóralív.

Fyrsta árið er málið at klekja 100 hønur. Fyri at gera tað, verður neyðugt at klekja 200 egg, tá helvtin jú verður til hanar. Tvær klekimaskinur eru fingnar til vega, sum taka 150 egg tilsamans. Klækt verður í apríl, mai og juni. Maskinan verður javnan fylt til málið er rokkið og 200 egg eru klækt.

Hvønn dag verða egg tikin, sorterað og løgd í bakkar við loki, sum hvør tekur 10 egg. Fyrsta árið verður selt til privatfólk burturav. Spakuliga verður ein kundaskari arbeiddur upp - reklaman er frá munni til munn. Hvønn mánadag verður selt í Suðuroynni og hvønn fríggjadag verður selt í Havn.

Seinni verður avtala gjørd við skip og hotell umframt støð, sum gera mat at selja út av húsinum. Matstovan á Hotel Føroyum, Koks, hevur longu víst áhuga fyri “Ordiligum Eggum”, sum eggini í Fámara verða kallað. Eisini verða avtalur gjørdar við fólk um aðrar vørur, so sum epli, grønmeti, rabarbur, jólagæs, jóladunnur og jólakalkunir. Selt verður úr einum bili, sum fer at koyra á ávísum, føstum rutum. Bilurin skal sjálvsagt innrættast til slíka sølu.

**Slátur av flogfenað**

Gamla mjólkirúmið verður innrættað sum sláturrúm til flogfenað. Hetta verður gjørt í samstarvi við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna. Tá kynið á høsnarungunum er sjónligt, verða teir umleið 100 hanaungarnir dripnir, royttir og pakkaðir. Høsnarungarnir í handlunum eru bert 28 dagar gamlir, Fámarahanarnir eru 6 mánaðir.

Royndirnar vísa, at fólk, sum virðismeta dygdargóða vøru, fegin gjalda eitt sindur meira enn vanligt fyri ein veruliga góðan høsnarunga. Tað sama er eisini galdandi fyri eggini. Tey verða seld til fólk, sum virðismeta náttúruna.

**Eplavelting**

Ætlanin er, at epli við tíðini skulu gerast næststørsta inntøkukelda á landbúnaðarøkinum í Fámara. Veltur verða gjørdar í nýtæðaðu jørðini. Hesar verða størri ár eftir ár, sum nýggja jørðin búnast og verður klár at velta.

**Grønmetisdyrkan**

Ætlanin er eisini at dyrka annað grønmeti enn epli. Í ár eru gjørdar royndir at sáa ymiskar rótfruktir og fleiri sløg av salati, og til heystar verða fyrstu úrslitini at síggja. Royndirnar av hesum fara at verða grundarlag undir framhaldandi menning á økinum.

**Drívhúshøll**

Í Fámara er ein stór høll, sum í løtuni manglar tak. Ætlanin er at leggja tak á høllina. Partar av hesum taki verður gjøgnumskygt, so høllin partvís verður innrættað sum drívhús og partvís sum kreativir verkstaðir, eitt nú vevistova, málaraverkstaður, snikkarastova við dreygubonki, jarnsmiðja, smykkudesignverkstaður, leirverkstaður, verkstaður til steinslíping o.a.

Ætlanin er at hava drívbonkar við hjólum, so hesir kunnu flytast av vegnum eftir tørvi. Royndir fara at verða gjørdar at planta grønmeti og frukt, blómur og runnar - bæði við plantum, sum seinni kunnu plantast úti eins og við ymiskum innanduraplantum. Eisini ynskja Rakul og Johan við árunum at gróðurseta eina lítla viðalund í Fámara.

**Djóragarður og -handil**

Í Fámara fara at verða øll møgulig djórasløg, eisini djór, sum ikki finnast í Føroyum í dag. Ætlanin er at innflyta grísar, ásin, smágeitir o.a., so Fámara verður fyrsti føroyski djóragarðurin, har barnafamiljur kunnu koma á vitjan at kína og fóðra djórunum.

Eisini fer at verða møguligt at keypa djór úr djóragarðinum. Um eitt barn t.d. ynskir sær ein marsvínaunga ella eina kanin, so fer at bera til at keypa júst hetta djórið.

Djórasløgini, sum longu eru í Fámara, eru hønur, dunnur, kalkunir, gæs, seyður, heimalamb, hestur, hundar, kettur, marsvín og ein stór skjaldbøka. Tað serstaka við djórunum í Fámara er, at tey øll eru spøk, so børnini kunnu t.d. fóðra hønunum, dunnunum og kalkununum við berum hondum.

Djóragarðurin fer at hava opið ávísar dagar í vikuni, og tað fer at kosta eina ávísa upphædd at sleppa inn. Inntøkurnar fara at verða nýttar til fóður og viðlíkahald.

**Djórahotel og -pensionat**

Í løtuni er ein gamal hundur á pensión í Fámara. Í Fámara er altíð onkur inni og djórini fáa allan tørv uppfyltan. Um fólk ætla sær út at ferðast og mangla onkran at taka sær av marsvíninum, hundinum, kettuni ella undulátunum, meðan tey eru burturstød, fer at verða møguligt at senda djórini til Fámara. Treytin er, at djórini duga og tola at vera saman við øðrum djórum.



*Djórini í Fámara kunnu fórðast við hondunum*

# Ferðavinna og mentan




*Fámarabergini*

**Í Fámara eru óteljandi møguleikar fyri at bjóða ferðavinnutilboð og gera mentanartiltøk. Talan kann bæði vera um rekreatiónsferðir og upplivingarferðir.**

Tvey tey seinastu árini hava ferðafólk víst vaksandi áhuga fyri Fámara, bæði føroyingar og útlendingar, og fólk hava verið dagligir gestir í Fámara summarhálvuna, t.v.s. at ferðavinnan er árstíðarbundið arbeiði.

Her eru nøkur av hugskotunum.

# Undirhald



*Johan á palli*

**Johan er undirhaldari, so møguligt verður at skipa fyri ymiskum mentanar- og undirhaldstiltøkum í Fámara. Talan kann verða um fyrilestrar, konsertir, sjónleik, listaframsýningar, spøl og annað. Bert hugflogið setur markið.**

**Eindagsvitjandi**

Um fólk ynskja at vera ein dag í Fámara, verður ætlan frammanundan løgd fyri dagin. Tá verður m.a.

- Fyrilestur á skránni, har Johan fortelur um garðin og um, hvussu og hví tey búsettu seg har á fyrsta sinni.
- Ein gongutúrur verður á økinum, og farið verður oman á eggina at hyggja eftir fuglum, kópum o.ø.
- Eisini verður møguleiki fyri rapelling, har tey ið ynskja tað, kunnu sleppa at klatra niðurav berginum. Johan eigur rapellingútgerð til endamálið og hevur ofta gjørt hetta bæði við útlendingum og føroyingum.
- Seinni verður skipað fyri (felags)sangi og undirhaldi
- Fámarafilmarnir verða vístir á stórskýggja, meðan matur og drekka verður at fáa.

# Upplivingar



*Fámara*

**Pílagrímsferðir**
Rakul og Johan hava longu knýtt samband og samstarv við fólk uttanlands, sum skipa fyri pílagrímsferðum í Føroyum. Tey hava nakrar ferðir havt slík ferðalið í Fámara.

Gestirnir kunnu gista og hava Fámara sum basu, meðan tey ferðast kring oynna, men eisini er møguleiki fyri, at tey ferðandi vitja í Fámara í nakrar tímar, har Rakul og Johan greiða eitt sindur frá søguni um Fámara, meðan tey ganga ein túr á økinum og kaga útav eggini. Johan hevur eisini roynt at hildið fyrilestrar, sungið og undirhildið fyri júst slíkum ferðaliðum.

**Bóndagarðsferðir**
Bóndagarðsferiur eru sera vælegnaðar til barnafamiljur ella onnur, ið fegin vilja uppliva nakrar avslappandi dagar í einum sera vøkrum landslagi við víðum sjónarringi og frískari luft, tætt við náttúruna og djórini á garðinum.

Í Fámara er ymiskt, sum bæði børn og vaksin kunnu taka lut í. M.a. at fóðra djórunum, sópa, strigla rossunum, ríða, ganga túr við hundunum, reinsa akvariið, læra at passa marsvínini, kaninurnar og ketturnar, byggja ymiskt, mála o.s.fr.

Familjurnar fara at kunna leiga kømur ella smáar íbúðir í Fámara, sum ætlanin er at gera, og sum fella inn sum ein natúrligur partur í virkseminum á garðinum.

Eisini er møguleiki fyri at familjurnar gera útferðir í økinum.

**Yvirlivilsistúrar**
Familjur, arbeiðspláss, feløg ella onnur kunnu bíleggja sær yvirlivilsistúrar í Fámara.

Alt tilfarið til Tippi-tjaldið til 100 fólk verður lagt fram, og so noyðast tey sjálvi at finna út av at fáa tjaldið upp at standa.

Fólkini fáa hondsag, spaka, wc-pappír, tilfar at baka breyð við o.a. Og so mugu tey klára seg sjálvi. Hetta er roynt fyrr, har 1. deild hjá einum hondbóltsfelag var í Fámara í eitt døgn.

Hesir túrarnir eru sera vælegnaðir til m.a. arbeiðspláss, tá tørvur er á at styrkja samstarvshugin, har tey m.a. saman fáa tjaldið upp at standa, fáa brenni til vega, kynda bálið og matgera. Nærleikin verður í hásæti, tá sólin fer niður, og fólk bara hóma hvønn annan.

**Legur**
Møguleiki er fyri at bólkar kunnu koma til Fámara á legu. Talan kann vera um ítróttar-, flokks- skóta- sjónleika-, tónleikalegur o.s.fr.

Matur verður við í prísinum á hesum legum, og skipað kann verða fyri fyri túrum í fjøllunum.

Tippi-tjaldið kann bæði nýtast til at sova í og annars til ymisk tiltøk.

Johan eigur eitt stórt ljóðanlegg, so møguleiki er at hava diskotek og dans um kvøldarnar.

**Kamping**
Ætlanin er at skapa betri umstøður hjá kampingfólki at koma til Fámara. Lendið er vallað, og el og vatn verður gjørt til endamálið. Eisini verður betri atgongd til wc og bað. Inntil hetta verður gjørt, ber tó væl til at tjalda og koma við húsvagni kortini.

Tippi-tjaldið verður nýtt sum felagsrúm, har skipað verður fyri ymiskum tiltøkum um dagin og kvøldið.

**Fyritøkur og aðrir bólkar**
Umstøðurnar í Fámara eru góðar til virkis- og samansjóðingartúrar, starvsfólkadagar og t.d. teambuilding.

Í Fámara kunnu damurnar ikki stinga av at shoppa, eins og tær kunnu í t.d. Klaksvík ella Runavík. Staðið er avbyrgt, langt burtur frá øllum, har er hvørki fartelefonsamband, sjónvarp ella útvarp, og tí verður nærveran so mikið intens, at fólk eru broytt, tá tey fara heimaftur.

Á hesum túrum er møguleiki fyri sera hugnaligum kvøldsetum í Tippi-tjaldinum ella inni í stovuni, og møguleiki verður at bíleggja undirhald, sang, fyrilestrar, karaokekappingar, rapelling o.a.

Eisini er møguleiki at hava fundir á staðnum, har:

- leiðslur t.d. kunnu koma eitt vikuskifti at gera visión fyri arbeiðsplássið
- politiskir flokkar kunnu koma og gista í nakrar dagar upp undir val og leggja valstrategi hjá flokkinum
- umstøðurnar eru eisini idéellar til skeiðsvirksemi.

**Tónleikabólkar, listafólk o.o.**
Tónleikabólkar kunnu koma til Fámara í t.d. eina viku og taka fløgu upp í Studio Fámara. Friðurin, atmosferan og orkan á staðnum eru heilt serstøk, og hetta fer at ávirka bæði kreativitetin og motivatiónina hjá tónleikarunum. Ongin stressandi studiotíð er, sum skal yvirhaldast, og tí verður onki óneyðugt vas og ongin skundur, sum kann ávirka hugin og framleiðsluna.

Á loftinum í Fámara er akkustikkurin ómetaliga góður og heitur, og hetta kann nýtast í upptøkunum.

Møguleiki er eisini fyri at Johan hjálpir til við klipping og mixing.

Umstøður eru eisini til, at listafólk kunnu koma í eitt styttri ella longri tíðarskeið, har tey í friði og náðum kunnu skapa eitt verk, uttan at verða órógvað. T.d. er møguligt at leiga seg inn í eitt kamar ella eina íbúð, og verða har í eina tíð.

Ikki er neyðugt at hugsa um matgerð og annað, tí hetta verður við í prísinum.

**Fámarafestivalur**
Hvørt ár verður skipað fyri einum non-profit Fámarafestivali, har vitjandi kunnu koma við tjaldi ella kampingvogni. Tippi-tjaldið, sum virkar sum pallur, verður sett mitt á fløtuna, har øll instrumentini, sum skulu nýtast, eru.

Fólk, sum duga at spæla tónleik, kunnu skriva seg upp á ein lista, og so verða “konsertirnar” skipaðar, alt eftir hvør meldar seg til.

Bæði Stígarnir og fløtan undir húsinum verða nýtt sum tjaldingarøki. Á festivalinum kunnu fólk koma við ymiskum heimagjørdum vørum, sum tey selja, so verður tað eisini eitt slag av marknaði.

Á festivalinum verður møguleiki at keypa sær okkurt at eta og drekka.

**Biltúrafólk / matsøla**
Hesi seinastu tvey árini hevur ein stríður streymur av biltúrafólki verið í Fámara alla summarhálvuna.

Ætlanin er, at Tippi-tjaldið, sum tekur 100 fólk, verður sett upp hvørt ár, eina viku áðrenn skúlabørnini fara í summarferiu, og tikið niður aftur eina viku eftir, at skúlarnir byrja aftur.

Inni í tjaldinum er altíð kaffi, te, sodavatn, eitt ílat við pannukakudeiggi, pannukakujarn og ljóðanlegg.

Ætlanin er seinni eisini at hava eina lítla café, har veljast kann millum nakrar serrættir úr Fámara, sum t.d. ektaðan høsnarunga við heimadyrkaðum kipsi, steiktum á kolkomfýri, heimagjørdan rabarbugreyt o.a.

Hetta skal alt sjálvandi lúka treytirnar hjá Heilsufrøðiligu Starvsstovuni.

# Umstøðurnar

Pláss er fyri í hvussu so er 12 sovandi gestum.
Møguleikar eru eisini at reiða ból.

Hegn fer at verða sett upp fram við eggini,
áðrenn ferðafólk fara at leita til Fámara komandi ár.

Ætlanin er at gera tað møguligt at selja mat og drekka
til gestirnar.

## Marknaðarføring umvegis radio og filmar

Rakul og Johan ætla, sum tey higartil hava gjørt, at framleiða filmar til YouTube o.a. og gera radio, sum lýsa arbeiðsgongdina í Fámara, og hendanvegin eisini reklamera fyri virkseminum á staðnum.

## Tiltøk, sum longu hava verið í Fámara :

- Posta hevur havt starvsfólkadag
- Deild hjá einum hondbóltsfelag hevur verið yvirlivilsistúr
- Tónleikabólkurin Marius hevur verið og tikið upp nakrar sangir til eina fløgu
- Tónleikavenjingarlega
- Fleiri ferðalið úr Danmark hava verið eindagstúr
- Familjuferiur, har familjur gista eitt vikuskifti
- Børn o.o. hava verið á bóndagarðsferiu
- Bindiklubbatúrar við gisting

# Sosial tiltøk



*Rakul og Johan í Fámara*

**Rakul og Johan eru bæði námsfrøðingar, og hava tí bæði vitan og førleika á økinum. Tey hava stórar hugsjónir og ætlanir at skapa umstøður í Fámara, sum kunnu hjálpa fólki, sum av eini ella aðrari orsøk ikki "passa inn" í etableraðu skipanina.**

Í Fámara kunnu trý fólk hava egið kamar, umframt at har er eitt stórt kamar, sum hevur fýra kovar, t.v.s. at í løtuni er pláss fyri sjey fólkum. Ætlanin er, at tann eini súrhoyggjabrunnurin verður gjørdur til smáar mini-íbúðir, har hvør hædd er ein íbúð. Treytin fyri, at fólk kunnu koma til Fámara er, at tey ynskja broyting og eru góð við djór.

**Pedagogiskt grundarlag**
Rakul og Johan trúgva, at sosialkonstruktionisma er ávikavist grundin til og loysnin á øllum trupulleikum, eitt menniskja kann hava. Hetta merkir, at um konstruktiónin verður broytt, so verður trupulleikin elimineraður. Á enskum eitur sjúka disease, og um orðið verður býtt upp, stendur dis-ease. Sjúka er við øðrum orðum eitt likam, sum ikki er "at ease".

Í Fámara verða umstøðurnar so, at onki likamligt ella sálarligt trýst verður til staðar. Hetta merkir, at kroppurin fær frið og sømdir til at gera tað, sum hann er ætlaður til, nevniliga at lekja seg sjálvan.

Í Fámara kann ein og hvør menna sítt íbygda potentiali, og hetta fer at gera, at likamið verður "at ease", sum so aftur merkir, at sjúka ikki trívist.

Rakul og Johan hava eisini ta áskoðan, at einstaka menniskjað altíð er eitt mál í sær sjálvum. Tilgongdin, tey brúka, verður nevnd ”recoverytilgongdin”, har tann einstaki finnur styrkina í sær sjálvum, og á tann hátt ein veg burtur úr sjúkuni. Í Fámara fær tann sinnissárbari álit og treysti til at koma seg. Viðkomandi fer at hava fólk uttan um seg, sum hava eitt heilhugað ynski um at hjálpa honum ella henni á kós aftur móti einum meiningsfullum lívi.

Sambært Rakul og Johan ber tað ikki til at byggja nakað upp rundan um eitt vakuum. Ein og hvør má hava okkurt, viðkomandi strembar og tráar eftir, og tað er hetta, sum skapar drívmegina og motivatiónina til lekingina. Tí verður serligur dentur lagdur á at finna fram til (kanska sløktar) dreymar og ynski hjá teimum, sum koma til Fámara, og so verður arbeitt fram móti at náa hesum máli. Hetta skapar nøgdsemi, menning og gleði, og er tí ein essentiellur partur av arbeiðinum hjá Rakul og Johan.

**Tilboð til fólk við øðrum tørvi**
Rúni Jacobsen hevur búð í Fámara í meira enn eitt ár. Sambært Rakul og Johan “feilar” Rúna onki. Hann er bara ikki líka sum øll onnur og hevur tí brúk fyri ymiskum øðrum, enn onnur fólk hava brúk fyri. Hann hevur ikki ein SERLIGAN tørv, hann hevur bara ein ANNAN tørv enn onnur hava, og hesin tørvur verður uppfyltur í Fámara, har hann hevur eina hóskandi ábyrgd av tí húsliga og hjálpir til við djórunum.

Eins og Rúni, so hava onnur fólk eisini møguleika at koma til Fámara at búgva í eitt styttri ella longri tíðarskeið. Sum sagt eru trý kømur í Fámara í løtuni, har Rúni eigur tað eina, t.v.s. at pláss er fyri tveimum fastbúgvandi persónum afturat.

Tey menniskjuni, sum koma til Fámara, verða møtt á tí støði, tey eru í lívinum, og ábyrgdin og hjálpin verður tillagað, alt eftir, hvønn tørv viðkomandi hevur.

Fólk við sinnistrupulleikum hava ofta verið ússalig leingi. Tað tekur tí langa tíð hjá teimum at koma fyri seg aftur - ein tilgongd, sum ikki kann skundast ígjøgnum, men sum krevur ta tíð, hon krevur. Fámara er ikki eitt sambýli við skiftandi vaktum og persónum, men eitt heim, har øll mugu hjálpast at fyri at fáa dagin at virka.

Tann jomfrúuligheit og óspiltheit, sum eyðkennir Fámara, skal varðveitast, og má undir ongum umstøðum fara at bera brá av institutión ella viðgerðarstaði. Fámara skal vera staðið, sum er dustsogið fyri institutiónseyðkenni, og øll í Fámara skulu liva undir somu treytum, og hava eina ávirkan á allar avgerðir, ið verða tiknar.

Samanrenningin av friði, meiningsfullum arbeiðið, einum tempo, fólk megna at fylgja, møguleikanum hjá teimum at vera fyri seg sjálvi og samstundis hava veruligt, erligt og ektað samband við fólk, sum vilja vera saman við teimum, hava virðing fyri teimum og góðtaka tey, sum tey eru, fer at gera umhvørvið í Fámara fyrimyndarligt at koma seg í.

**Kúlladreingir/gentur**
Johan hevur nógvar royndir við at hava “kúlladreingir” búgvandi. Hetta eru børn, sum typiskt ikki klára seg so væl í skúlanum, og sum ofta eru aktivari enn onnur børn. Í Fámara fáa hesi børn hóskandi avbjóðingar, har tey kunnu rokast við djórunum og hjálpa til við arbeiðinum á garðinum. Eisini fáa tey tað uppmerksemi, tann kærleika og ta sálarhvíld, sum teimum tørvar. Lektiuhjálp er eisini við í tilboðinum.

Sum námsfrøðingar hava Rakul og Johan bæði serligar førleikar innan júst barna-/unglingaøkið. Barnið kann vera fastbúgvandi í Fámara, men møguleiki er eisini, at tað kemur nakrar dagar um

vikuna. Samstarv um júst hetta er longu tikið upp við Þorkeris/Vágs kommunu, og Tvøroyrar kommuna hevur eisini víst stóran áhuga fyri hesum tilboði.

**Pleygufamilja**

Tilsamans hava sjey pleygubørn búð hjá Johan, tá hann búði í Kollafirði. Onkur hevur enntá búð har í sjey ár. Rakul og Johan ynskja eisini at bjóða seg fram sum pleygufamilja, har tey kunnu taka børn til sín, og vera fyri tey, sum vóru tey teirra egnu.

Rakul og Johan hava ongi børn saman, men Johan eigur fýra børn saman við fyrrverandi konuni. Í Fámara kunnu tey bjóða børnunum kærleika og tryggleika, onkur er altíð heima, har eru ein rúgva av djórum, og tí kunnu tey liva eitt lív í friði og náðum. Um børnini ganga í skúla, tekur tað bara 10-12 minuttir at koyra til Vágs.

**Rekonvalesens- / rekreatiónsstaður**

Fámara er tað ideella staðið, tá tað kemur til rekonvalesens og rekreatión, tí plássið liggur so avsíðis, at einki stress er. Fólk kunnu fara upp, tá tey vakna, í song, tá tey eru troytt, og pláss er fyri øllum. Øll kunnu koma í eina óhepna støðu, t.d. fáa depressión, missa onkran kæran, koma út í misnýtslu av einum ella øðrum slag o.s.fr. Hesi fólk kunnu koma til Fámara.

**Eftirviðgerð**

Í Føroyum er tørvur á einum stað, har fólk, sum t.d. hava verið í viðgerð á Blákrossheiminum ella Heilbrigdinum kunnu fara, tá viðgerðin er liðug. Ein viðgerð tekur uml. 6 vikur, og eftir tað noyðast fólk ofta út aftur í tað sama, tey komu frá, og tað er ikki altíð, tey eru nóg sterk til tað.

Tí ynskja Rakul og Johan at bjóða hesum menniskjum at koma burtur frá øllum í eina tíð eftir lokna viðgerð. Í Fámara kunnu fólkini fáa hjálp frá Rakul og Johan at byggja seg sjálvi upp, so tey kunnu fara út aftur í lívið, tá tey sjálvi føla, at tey eru klár til tað. Innan hetta økið hava bæði Rakul og Johan royndir og kunnleika. Johan er edrúur alkoholikari og hevur verið ígjøgnum nógvar viðgerðir, Rakul er avvarðandi, og var í starvslæru á Blákrossheiminum, tá hon læs til námsfrøðing.

# Fámara – eitt stað fyri øll

Tað er ikki neyðugt at fólki “feila” nakað fyri at sleppa til Fámara.

- Fólk kunnu koma og hjálpa til á garðinum við tí, tey nú einaferð hava hug og hegni til.
- Einsamøll fólk, sum ongan góðan hava, kunnu eisini koma at verða partur av felagsskapinum, og taka lut í arbeiðinum á garðinum.
- Fólk, sum eru kedd, kunnu koma at blíva glað aftur.
- Fólk kunnu koma at finna seg sjálvi.
- Ung fólk, sum ongin skilir, kunnu koma at síggja eina meining við lívinum.
- Fólk, sum føla seg sum eina byrðu, kunnu koma at gera nyttu og verða vird.

Tað er ikki ein treyt at hava eina diagnosu fyri at búgva í Fámara, tí har er pláss og hjartarúm fyri øllum

meira enn bara

FAMARA